gult18 cyan18 magenta18 svart18



NSÍ-GÍ 1-2 (1-1)

# Gøtumenn vinna eisini tá teir ikki eru á tindinum

**Linligur stevnudystur í Runavík, har heimaliðið var við alla tíðina, sjálvt um teir í 1. hálvleiki mistu liðformannin**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Tað var dyggur smeitur fyri NSÍ, tá Djóni N. Joensen varð rikin av vølli fyri hevnisøku*
*Mynd: Jonhard Hammer*

Fótbóltslíkindini vóru av teimum allar bestu, og tað var gylt av fólki kring vøllin í Runavík. Spenningur var í alla tíðina, tí dysturin reið um snarið. Sum í teimum seks undanfarnu umførunum, so fóru gøtumenn eisini hesa ferð við øllum.

Vanliga leiktíðin var um at vera farin, tá GÍ fekk sigursmálið. Stóru GÍ verjumenninir – Leivur Hansen, Bartal Eliasen og Poul Ennigarð – vóru ofta frammi í deyðbóltsstøðunum. Arnfinn Langgaard, Dánial Hansen og Djóni N. Joensen (inntil hann varð rikin av vøllinum) royndu at byrgja uppfyri í NSÍ brotsteiginum, har Jens Martin Knudsen bæði var tryggur á strikuni og longri úti í brotsteiginum. Men ta einu ferðina kiksaði uppdekkingin, og tað kostaði sigursmálið til GÍ. Eftir hornaspark úr høgru var Poul Ennigarð hægstur, og úr níggju metrum og mitt fyri drønstútaði hann. Fleiri NSÍ menn royndu at bjarga á strikuni, men bólturin hevði verið ein góðan fót innanfyri strikuna, og so var greitt, at Gí fór til hús við øllum stigunum og stevnusteypinum.

Fyri NSÍ kendist hetta rættuliga snópisligt. Allan 2. hálvleik vóru teir undirmannaðir. Teir høvdu spent í, og alt bendi á, at tað skuldi eydnast teimum í hvussu so er at varðveita eina stigið.

At teir vóru undirmannaðir komst av, at Birgir Sondum longu í 1. hálvleiki vísti Djóna N. Joensen reyða kortið, tí NSÍ liðformaðurin eftir nærdyst, sum frísparksstøða stóðst av, hevði hevnt seg.

Hjá NSÍ var tað sera dýrt, at teir mistu ein týdningarmiklan mann. Teir plaga ofta at hava takið á GÍ í Runavík, og sjálvt um NSÍ kom illa frá byrjanina hesa ferð, so tóktist tað, sum um teir rættuliga skuldu hótta oddaliðið.

## Málini í 1. hálvleiki

GÍ var sera nógv skert av, at liðformaðurin hjá teimum, Sámal Joensen, ikki var við. Men kortini megnaðu gøtumenn at seta hol á beinanvegin. Sekundvísarin hevði bara verið gott og væl eina ferð runt, tá Helgi L. Petersen hevði skorað. Eftir málið høvdu gestirnir greiða yvirvág, og tað lá í luftini, at leiðslan so skjótt kundi tvífaldast. Men GÍ fekk ikki fleiri mál, sjálvt um teir høvdu onkrar møguleikar. Jens Martin bjargaði væl einar tvær ferðir, og Óli Hansen heilkiksaði, eftir at Magni Jarnskor snilt hevði spælt hann leysan.

Í staðin megnaði heimaliðið at javna í 22. minutti. Sjúrður Jacobsen sendi fríspark beinleiðis í málið. So var tað, at Djóni N. Joensen varð rikin av vøllinum. Útvísingin átti at havt givið GÍ yvirvág, men inntil tað bara restaði ein ikki serliga long løta sást lítið til hetta.

NSÍ hevði fleiri vandamikil álop, og tað var um reppið, at Christian Høgni Jacobsen, sum tyktist vera væl fyri, legði teir framum. Í skjótálopi sneiddi hann framvið trimum, áðrenn hann royndi ímóti málinum. Hevði hann ansað, at Ian Højgaard, sum saman við Brynjolvi Nielsen leingi spældi væl á miðvøllinum, var púra blankur í hinum borðinum.

## Tolin trívst

Seinna umfarið var spælið ikki tað, sum kann roknast við frá oddaliði, ið hevur undirmannað lið ímóti sær. Men gøtumenn vóru tolnir. Teir tóktust rokna við, at møguleikin kanska fór at koma at skora sigursmálið, og hann kom. Um hann ikki hevði komið, so høvdu teir í GÍ væl kunna liva við javnleikinum.

Undir øllum umstøðum tóktist tað mest avgerandi, at NSÍ ikki vann. Eftir at Djóni N. Joensen var farin út, tók NSÍ Sonna L. Petersen úr álopinum og aftur á miðvøllin. Tað vil siga, at Christian Høgni Jacobsen var einsamallur í fremstu røð. Kortini hildu gøtumenn allar tríggjar verjuspælararnar afturi á vøllinum. Johan Nielsen vísti harvið virðing fyri landsliðsmanninum, men samstundis mundi hann rokna við, at møguleikin at fáa sigursmálið fór at koma.

Síðstu løtuna rindaði NSÍ prísin fyri, at teir høvdu runnið og tuskað so nógv. Gí trýsti, men teir megnaðu ikki at spæla seg til upplagdar møguleikar. Kortini fingu teir sigursmálið, og tá gøtufólk fóru aftur um Gøtueið, ella tá tey hildu fram at halda stevnu, so høvdu tey gloymt, at avrikið hesa ferð ikki var oddaliði verdugt. GÍ hevði fingið øll stigini, og GÍ er framvegis ósigrað.

**Dysturin í tølum:**
NSÍ-GÍ 1-2 (1-1)
0-1: Helgi L. Petersen 13
1-1: Sjúrður Petersen 23
1-2: Poul Ennigarð 90

Dómari:
Birgir Sondum (B36)

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Dánial Hansen, Arnfinn Langgaard, Djóni N. Joensen, Eddie Mikkelsen – Gert Langgaard, Ian Højgaard, Sjúrður Jacobsen, Brynjolvur Nielsen – Sonni L. Petersen, Christian Høgni Jacobsen
**GÍ:** Hallur Hansen – Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen – Hans Pauli Petersen, Áslakur R. Petersen, Magni Jarnskor, Zdislaw Janik, Henning Jarnskor – Óli Hansen, Helgi L. Petersen




gult19 cyan19 magenta19 svart19



# Óli í brennideplinum

**Liðformaðurin á landsliðnum skoraði fyri fyrstu ferð, síðani hann kom til Hvidovre, og so gjørdi hann eisini sjálvmál**

DANMARK
*Jóannes Hansen*

Tað hevur verið nógv skrivað og sagt um felagið hjá Óla Johannesen, Hvidovre, hesa síðstu vikuna. Tosið hevur fyrst og fremst snúð seg um Peter Schmeichel, sum tykist vera evni til yvirskiftir í øllum teimum donsku miðlunum, tá hann sigur okkurt, og eisini, tá hann velur at tiga og einki siga.

Eitt er, at stóri málverjin er givin í Portugal, og at miðlarnir hava kappast at vera fyrstir við søguni um, hvagar leiðin nú gongur. Men frá einum føroyskum sjónarmiði eru tíðindini meiri áhugaverd, sum siga, at Peter Schmeichel hevur givið Hvidovre krakk. Tað sigst, at eitt ára gomlu ætlanirnar um, at pengarnir hjá Schmeichel skulu vera við til at draga Hvidovre fram aftur í fremstu røð, ikki eru galdandi meiri.

Nógv hevur verið sagt og skrivað um hetta, men málverjin hevur ikki sjálvur úttalað seg í nógvar dagar.

## Leikluturin hjá Óla

Síðsta umfarið í næstbestu deildini í Danmark varð spælt sunnudagin. Óli Johannesen og liðfelagarnir hjá honum í Hvidovre vóru í Randers og dystaðust ímóti felagnum hjá Atla Gregersen.

Úrslitið var 3–2 til Hvidovre, og Óli Johannesen gjørdi ein orduligan vørr. Í 49. minutti javnaði hann til 1–1. Málið hevði við sær, at Hvidovre av álvara kom inn í dystin. Teir komu framum 3–1, men tá tíggju minuttir vóru eftir, minkaði Randers Freja um munin. Óli Johannesen gjørdi sjálvmál! Talan var um fyrsta málið hjá Óla, síðani hann eftir ársskiftið kom til Hvidovre, og talan var eisini um fyrsta sjálvmálið.

Hvidovre endaði á tíggjunda plássi við 38 stigum. Teir høvdu miðjað eftir sætta plássinum. Seks stig vóru upp til sætta plássið. Randers Freja endaði á 11. plássi við 33 stigum.

## Gamlir kenningar

Esbjerg hevði fyri langari tíð síðani tryggjað sær annað uppflytingarplássið. Stóri spenningurin sunnudagin var, um tað skuldi verða Vejle, Køge ella Frem, sum fór við hinum plássinum. Vejle vann 4–2 í Esbjerg, og harvið gjørdu teir sjálvir av, at teir skuldu flyta upp. Teir høvdu eisini flutt upp, um teir taptu, tí bæði Frem og Køge taptu sínar dystir.

Fyri fótbóltin í Danmark kemur tað ivaleyst væl við, at Esbjerg og Vejle flyta upp í staðin fyri feløg úr høvuðsstaðar økinum. Bæði Esbjerg og Vejle eru kend og vird feløg í Danmark, og tað verður roknað við, at tey verða við til at gera superliguna meiri áhugaverda, enn Frem og Køge høvdu gjørt. Stóri spurningurin er nú, hvussu gomlu kenningarnir fara at standa seg í fremstu røð. Eftir uppflytingina søgdu býráðini og vinnulívini bæði í Esbjerg og Vejle, at teirra lutur skal ikki liggja eftir. So fáa vit at síggja, hvussu tað fer at kennast aftur á úrslitunum og støðutalvuni um eitt ár.

# Kurt legði upp til sigursmálið

**Sogndal vann trý sera týdningarmikil stig á útivølli í Bryn, og Kurt Mørkøre, sum var á vøllinum síðsta hálva tíman, átti næstsíðsta fótin á sigursmálinum**

TIPPELIGA
*Jóannes Hansen*

Flestu landskappingarnar í Europa eru farnar í summarfrí. Men í Noregi verður spælt av lívsins kreftum. Sogndal er framvegis føroyska felagið. Sum sagt í síðstu viku, so er Julian Johnsson seldur til Hull. Hann var ikki við sunnudagin – hvørki ímillum teir fyrstu ellivu ella sum útskiftari. Vit hava skilt, at Julian hevur spælt sín síðsta dyst fyri Sogndal.

Kurt Mørkøre er framvegis í Sogndal. Hesa ferð var hann á beinkinum. Men beint aftaná at Sogndal hevði javnað til 2–2 – tá restaði ein hálvur tími – varð Kurt skiftur inn, og hann gjørdi um seg. Fyrst fekk hann gula kortið, og so átti hann uppleggið til sigursmálið, sum varð skorað, tá tað bara restaðu tveir minuttir.

Málskjútti var Roar Frederiksen. Hann er fyrrverandi verjuspælari, sum nú er umskúlaður til álopsspælara. Og tað tykist vera ein heppin avgerð. Tí hesin Roar Frederiksen skoraði øll trý málini hjá Sogndal.

Sigurin bar við sær, at Sogndal fekk luft í botnstríðnum.

# Balslev runt

**Árliga kappingin hjá Balslev og Tórshavnar súkklufelag varð hildin um vikuskiftið**

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Leygardagin skipaðu súkklarar úr Tórshavnar Súkklufelag saman við Balslev fyri afturvendandi Balslev Runt súkklukappingini.

Súkklað varð rundan um bygningin og undirtøkan var rættiliga góð. Umleið 50 børn frá 4. til 7. flokk kappaðust.

Kappaðst varð í tveimum bólkum. Meðan børn úr 4. og 5. flokki kappaðust sínámillum, so kappaðust børn úr 6. og 7. flokki ímóti hvør øðrum.

**Úrslit:**

Dreingir 4. og 5. flokkur:

| Nr. | Navn | Skúli | Flokkur |
|---|---|---|---|
| 1. | Johan Ellingsgaard | Skt. Frants skúli | 5. |
| 2. | Rúni Bláfoss | Eysturskúlin | 4. |
| 3. | Rani G. Jacobsen | Eysturskúlin | 4. |

Gentur 4. og 5. flokkur:

| Nr. | Navn | Skúli | Flokkur |
|---|---|---|---|
| 1. | Randi G. Jacobsen | Eysturskúlin | 5. |
| 2. | Laura Dahl | Hoyvíkar Skúli | 5. |
| 3. | Simonika H. Egholm | Adventista Skúlin | 4. |

Dreingir 6. og 7. flokkur:

| Nr. | Navn | Skúli | Flokkur |
|---|---|---|---|
| 1. | Beinir Jacobsen | Skt. Frants skúli | 7. |
| 2. | Annfinn Danielsen | Adventistaskúlin | 6. |
| 3. | Jákup Lutzen | Kommunuskúlin | 6. |

Dreingir 6. og 7. flokkur:

| Nr. | Navn | Skúli | Flokkur |
|---|---|---|---|
| 1. | Karin Højgaard | Skt. Frantsskúli | 6. |



*Umleið 50 børn súkklaðu kapp í góðveðrinum leygardagin*

# Hagtøl

Sum vit áður hava gjørt vart við í blaðnum, so er blaðið skert vegna umbygging á Prentmiðstøðini. Orsakað av hesum verða leikarahagtølini fyri fyrstu deild, eins og úrslit og støður úr aðru deild ikki við fyrr enn í mikudagsblaðnum. Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar.

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 7 | 7 - 0 - 0 | 24 | 8 | 16 | 21 |
| 2 | B36 | 7 | 5 - 1 - 1 | 29 | 4 | 25 | 16 |
| 3 | HB | 7 | 4 - 1 - 2 | 14 | 7 | 7 | 13 |
| 4 | VB | 7 | 4 - 0 - 3 | 21 | 8 | 13 | 12 |
| 5 | B68 | 7 | 3 - 1 - 3 | 15 | 14 | 1 | 10 |
| 6 | KÍ | 7 | 3 - 0 - 4 | 7 | 16 | -9 | 9 |
| 7 | NSÍ | 7 | 2 - 2 - 3 | 7 | 12 | -5 | 8 |
| 8 | EB/Streymur | 7 | 2 - 0 - 5 | 8 | 14 | -6 | 6 |
| 9 | B71 | 7 | 1 - 1 - 5 | 6 | 14 | -8 | 4 |
| 10 | FS Vágar | 7 | 1 - 0 - 6 | 6 | 40 | -34 | 3 |

**Máltindurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Helgi L. Petersen | GÍ | 12 |
| John Petersen | B36 | 9 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 6 |
| Sámal Joensen | GÍ | 6 |
| Krzystof Popczynski | VB | 6 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 5 |
| Jákup á Borg | B36 | 4 |
| Magni á Lakjuni | B36 | 4 |
| Sorin Anghel | EB/Streymur | 4 |
| Birgir Jørgensen | VB | 4 |
| Kenneth Jacobsen | B36 | 3 |
| Fróði Benjaminsen | B68 | 3 |
| "Marcelo" Marcelino | B68 | 3 |
| Jón Sigurð Gleðisheygg | EB/Streymur | 3 |
| Uni Arge | HB | 3 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 3 |
| Aleksander Djordjevic | KÍ | 3 |
| Jón Pauli Olsen | VB | 3 |
| Marek Vierzbicki | VB | 3 |

**Støðan, danska 1. deild**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Esbjerg | 30 | 19 - 8 - 3 | 79 | 29 | 50 | 65 |
| 2 | Vejle | 30 | 17 - 8 - 5 | 73 | 37 | 36 | 59 |
| 3 | Køge | 30 | 16 - 8 - 6 | 60 | 36 | 24 | 56 |
| 4 | Frem | 30 | 16 - 7 - 7 | 64 | 34 | 30 | 55 |
| 5 | Farum | 30 | 15 - 5 - 10 | 62 | 48 | 14 | 50 |
| 6 | B93 | 30 | 13 - 5 - 12 | 52 | 46 | 6 | 44 |
| 7 | AC Horsens | 30 | 11 - 10 - 9 | 41 | 38 | 3 | 43 |
| 8 | B 1913 | 30 | 11 - 9 - 10 | 42 | 46 | -4 | 42 |
| 9 | Brønshøj | 30 | 13 - 2 - 15 | 54 | 57 | -3 | 41 |
| 10 | Hvidovre | 30 | 10 - 8 - 12 | 55 | 55 | 0 | 38 |
| 11 | Randers F. | 30 | 9 - 6 - 15 | 42 | 57 | -15 | 33 |
| 12 | FC Aarhus | 30 | 8 - 9 - 13 | 42 | 65 | -23 | 33 |
| 13 | Skive | 30 | 8 - 8 - 14 | 52 | 73 | -21 | 32 |
| 14 | Fremad A | 30 | 8 - 7 - 15 | 43 | 64 | -21 | 31 |
| 15 | Ølstykke | 30 | 8 - 6 - 16 | 38 | 76 | -38 | 30 |
| 16 | Birkerød | 30 | 3 - 4 - 23 | 42 | 80 | -38 | 13 |

**Støðan, norska tippeligan**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg | 11 | 8 - 2 - 1 | 32 | 12 | 20 | 26 |
| 2 | Viking | 11 | 8 - 2 - 1 | 24 | 11 | 13 | 26 |
| 3 | Brann | 11 | 6 - 2 - 3 | 29 | 17 | 12 | 20 |
| 4 | Odd. Grenl. | 11 | 6 - 2 - 3 | 21 | 11 | 10 | 20 |
| 5 | Lillestrøm | 11 | 6 - 2 - 3 | 22 | 17 | 5 | 20 |
| 6 | Stabæk | 11 | 6 - 1 - 4 | 17 | 20 | -3 | 19 |
| 7 | Molde | 11 | 5 - 2 - 4 | 23 | 19 | 4 | 17 |
| 8 | Moss | 11 | 5 - 1 - 5 | 16 | 17 | -1 | 16 |
| 9 | Sogndal | 11 | 4 - 0 - 7 | 12 | 25 | -13 | 12 |
| 10 | Strømgodset | 11 | 2 - 4 - 5 | 16 | 26 | -10 | 10 |
| 11 | Tromsø | 11 | 3 - 0 - 8 | 8 | 18 | -10 | 9 |
| 12 | Bryne | 11 | 2 - 2 - 7 | 12 | 23 | -11 | 8 |
| 13 | Lyn | 11 | 1 - 4 - 6 | 13 | 19 | -6 | 7 |
| 14 | Bodø/Glimt | 11 | 1 - 4 - 6 | 10 | 20 | -10 | 7 |